## Vinnulán upp um 5 mia kr.




*Myndin sýnir gongdina í føroyskum vinnuútlánum*

Útlánið til føroyskar vinnufyritøkur hevur sett met, vísur nýggj kanning hjá landsbankanum

Í kanningini eru tó eingi hagtøl yvir útlendska fígging til føroyskt vinnulív, men hendan er tó neyvan minni í dag, enn hon hevur verið undanfarnu árini.

Á heimasíðuni sigur Landsbankin - við fyrivarni fyri vantandi útlendsku tølunum - gongdin í útlánunum kann takast sum partur av tí framgongd, ið er at síggja í búskapinum. Fyrst og fremst sum økta lánfígging til íløgur í vinnutól, men eisini til beinleiðis keyp av fyritøkum.

**-mørk**

## Nógv ferðaðust á páskum

Ferðafólkatalið um flogvøllin var 17,7% størri í apríl mánaði í ár sammett við apríl mánað í fjør

Tilsamans ferðast 15.598 ferðafólk um flogvøllin í apríl mánaði. Í fjør var talið 13.251. Størsti munurin er uttan iva, at páskahøgtíðin í fjør var í mars, meðan hon í ar var í apríl mánaði. Nakað sum eisini sást aftur í hagtølunum fyri mars, har tølini í 2004 vóru størri, enn tey vóru í ár.

Samanlagt fyri árið hevur talan verið um vøkstur í ferðafólkatalinum upp á 9% í 2006. Hinvegin hava fráferðirnar og komurnar verið færri higartil í ár.

**-mørk**

## MC-Boogie til Klaksvíkar

Leygardagin verður árligi felagstúrurin hjá MC-Boogie, ið er felagsskapurin fyri øll motorsúkkluáhugað í Føroyum.

Klokkan 10 savnast ferðalagið við Shellstøðina við Ringvegin í Havn, og síðani verður leiðin løgd norðureftir. Kósin gongur fyrst til bátastevnuna á Toftum, áðrenn farið verður víðari gjøgnum undirsjóvartunnilin til Klaksvíkar.

Meira kunning er annars um tiltakið á heimasíðuni, www.foroya-mc.fo.

**-mørk**

## Langur leygardagur á Sandoynni



Leygardagin verður langur leygardagur í Sandoynni, har tey eisini vilja fáa part av fyrimuninum, nú alt ferðasamband við Strandferðsluni er ókeypis hesa vikuna.

Nærum allir handlar, matstovur, hárfríðkanarstovur og kioskir eru við í átakinum. Tey spenna seg út við ymiskum tilboðum til hendan dagin. Matstovan Texas Cafè hevur eisini eitthvørt spennandi mattilboð, so ein fer ikki svangur úr oynni aftur. Verður veðrið gott, vænta sandoyingar nógv vitjandi.

Sandoyar Kunningarstova samskipar hendan dagin.

# Kári Sverrisson bergtók á Skarv

Væl av fólki hevði leitað sær inn í Pilestræde, tá Kári Sverrisson við gittara og sangi spældi eina frálíka konsert á nýggja føroyska spælistaðnum, í uppafturlatnu føroyinga barrini Skarv.

Nógvir útisetar stóðu lið um lið og lurtaðu eftir Kára, ið framførdi sín eyðkenda tónleik við síni eyðkendu rødd, ið fyrr í ár var nóg mikið til, at hann var millum uppskotini til ársins sangara á Planet Awards.



*Kári Sverrisson*

Áhoyrarnir klappaðu óført eftir hvørt lag. Kári framførdi tey bæði ætlaðu umførini, men fólkið vildi hava meira, og hann spældi tí eitt eyka umfar av tónleiki.

Av Skarv siga tey seg vera væl nøgd við, at fáa eina so forkunnunga vitjan úr Føroyum. Tey lótu eisini at, at Kári, ið bert var í Danmark í sambandi við hetta tiltakið, segði seg vera væl nøgdan aftan á longu framførsluna á Skarv.

**nud**

# Knút og Rasmus í Rokkstovuni

Tá Rasmus Rasmussen her fyri flutti av landinum, var Knút Háberg Eysturstein settur í Rasmusa stað sum vertur í Rokkstovuni, men nú er Rasmus aftur í Føroyum, og tí hava gitingar verið frammi,um hvør nú verður vertur í Rokkstovuni. Enn er hesin spurningur ikki alment svaraður, men hósdagin gerast vit kanska klókari, tá Rokkstovan fer í luftina við Knúti og Rasmusi báðum handan mikrofonina.

Rasmus fylgdi í vikuskiftinum emo-punkarunum í The Dreams á teirra minikonsertferð í Føroyum, og tað er ein frálíka undirhaldandi frásøgn komin burturúr. Eisini hoyra vit 2 løg við bólkinum umframt spildurnýtt Tool, The Flaming Lips, Morrissey, Clap your hands say yeah, Editors o.s.fr., sigur Knút, ið tó einki nevnir um hvør er vertur í næstu viku.

Rokkstovan verður send í Útvarpinum hósdagin kl. 17.05

**nud**

# Blue 7 við Thorbjørn Risager á Jóansøkufestivalin

**Eitt av størstu donsku blús nøvnunum seinnu árini, Thorbjørn Risager og bólkurin Blue 7 fara á pallin á Jóansøkufestivalinum**

*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*

Bólkurin Blue 7 við Thorbjørn Risager er eitt tað best umtókta blús navnið í Danmark í dag. Hetta er ein bólkur við framúr góðum og royndum tónleikarum, sum tekniskt eru ómetaliga væl fyri, men í hesum sambandi leggja mest í, at sálin og hjarta eru við í framførslunum. Teir eru Thorbjørn Risager (rødd og gittar), Emil Balsgaard (klaver og orgul), Kasper Wagner (tenor og altsaksofon), Andreas Biilmann (trompet), Svein Erik Martinsen (gittar), Søren Bøjgaard (bass) Martin Seidelin (Trummur)

Bólkurin er serliga vælumtóktur í Keypmannahavnar økinum, har hann ferð eftir ferð gevur fantastiskar konsertir fyri stúgvandi fullum spælistøðum.

Thorbjørn Risager: Blue 7 spælir bæði egnar sangir/løg og nýggjar samansetingar av gomlum R & B klassikarum. Stílurin er inspireraður frá R & B tónleikinum frá 1950unum og 1960unum, kryddaður við New Orleans Secondline. Í 2004 kom fyrsta fløga við bólkinum.

Thorbjørn Risager hevur á óteljandi konsertum í øllum Skandinavia sligið navn sítt fast sum ein av allar bestu donsku og skandinavisku sangarunum og ein framúr góður blues-gittarleikari. Í september í fjør varð hann kosin Ársins Danska Bluesnavn 2005.

# Føroyar eiga ársins pengaseðil

**Nýggi føroyski 1.000 krónur-seðilin er kosin "Ársins Pengaseðil 2006". Tað er The International Bank Note Society, ein altjóða áhugafelagsskapur fyri pengaseðlasavnarar, ið hevur peikað á føroyska pengaseðilin til hendan heiður**



**PENGASEÐLAR**
*tíðndaskriv*

Ein stórur heiður er fallin Føroyum í lut, tá tað snýr seg um útgávu av pengaseðlum. The International Bank Note Society (IBNS), ein altjóða áhugafelagsskapur fyri pengaseðlasavnarar, hevur júst kosið tann nýggja føroyska 1.000 krónur-seðilin "Ársins Pengaseðil".

Í einari fráboðan frá IBNS ynskir formaðurin í felagsskapinum, Peter Symes, Føroyum og Tjóðbankanum tillukku við heiðurinum. Gjaldoyramál er danskt málsøki.

– Heiðurin, Ársins Pengaseðil 2006, verður latin einum pengaseðli, sum varð útgivin í 2005, og sum dómararnir halda vera seðilin, ið á best skikkaðan hátt sameinir listarligar dygdir, nýhugsan og trygd. Vit halda, at hesin seðilin hevur heiðurin fult uppibornan, skrivar The International Bank Note Society m.a. í brævi til tjóðbankastjóran, Nils Bernstein.

Føroyski seðilin er óvanligur, vakur og tryggur alt um eina leið, heldur dómsnevndin hjá IBNS.

Í grundgevingini fyri at kjósa føroyska 1.000 krónur-seðilin vísir dómsnevndin m.a. á motivini, ið listamaðurin, Zacharias Heinesen, hevur gjørt. Dómararnir vísa á, at meðan flestu pengaseðlar hava motiv, ið upprunaliga eru fotograferað ella teknað, er seinasta røðin av føroyskum pengaseðlum prýdd við myndum úr vatnlitum. Higartil hevur bert í undantaksføri hepnast útgevarum at fáa góðar og vakrar pengaseðlar við vatnlitsmyndum.

Felagsskapurin sigur seg viðurkenna eitt framúr gott íkast til menningina av pappírspeningi.

– Hetta er ein sera gleðiligur tilburður og ein altjóða viðurkenning, sum vit í Føroyum bert kunnu fegnast um", sigur Bárður Nielsen, landsstýrismaður í fíggjarmálum.